## Hagtølini bíða

Undir givnu umstøðunum gjørdist framleiðslan av blaðnum í dag heldur rokalig. Ein avleiðing av hesum varð, at síðan við hagtølunum fyri 24. umfar av Formula-deildini ikki er partur av dagsins útgávu. Hagtølini saman við Formula-liðnum verða ístaðin at síggja í týsdagsútgávu okkara.



## Ronaldinho søkti Inter

Brasilska stjørnan Ronaldinho hevur seinasta árið ikki spælt á tí støðinum, sum hann annars hevur spælt, men um vikuskiftið gjørdi hann aftur um seg. Hann skoraði einasta málið, tá AC Milan vann týdningarmikla grannadystin ímóti Inter. Málið kom í fyrra hálvleiki, eftir at Kaka legði inn fyri, og so kundi Ronaldinho stúta bóltin í kassan.

# Rógvi og Lava á bíðilista

**Landsliðsúttøkan mánamorgunin gav ikki óvæntað rúmd til Fróða Benjaminsen og Christian Lamhauge Holst, sum nú aftur eru tøkir eftir skaðasteðg**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Gunnar Nielsen hevur higar til vart føroyska U21-málið, men nú er hann til reiðar at taka sessin sum varðamaður hjá Jákupi Mikkelsen*

Eftir at hópurin mest sum alt landsliðsárið hevur verið sundurpettaður av skaðum, var tað á leið ein intaktur hópur, sum Jógvan Martin Olsen kundi seta nøvn á, tá hann mánamorgunin boðaði frá, hvørjar spælarar hann hevur valt at taka út til komandi landsliðsuppgávurnar, sum eru móti ávíkavist Eysturríki og Litava.

Vanliga telur landsliðshópurin 18 mans, men í úttøkuni hesa ferð eru 20 spælarar, umframt at hálvskaddu og ivasomu Rógvi Jacobsen og Andreas Lava Olsen standa á bíðilista, um teir skuldu verið tøkir.

Nýggir í hópinum eru Gunnar Nielsen, sum hevur vart málið á U21-landsliðnum, men nú tann kappingin er av, tykist ógvuliga sannlíkt, at Gunnar fer at at taka plássið sum varðamaður hjá Jákupi Mikkelsen.

Hartil eru Fróði Benjaminsen og Christian Lamhauge Holst eisini við í hópinum aftur, og tað gevur landsliðsvenjaranum nøkur áhugaverd alternativ. Fróði hevur seinnu árini verið stýrimaður í verjuni, men Egil á Bø hevur verið somikið sannførandi vikarur á tí plássinum, at Jógvan Martin Olsen als ikki vildi garantera, at tað verður í verjuni, at hann fer at brúka Fróða Benjaminsen.

Og longur frammi á vøllinum gevur Christian Lamhauge Holst eisini nýggjar møguleikar. Silkeborg spælarin hevur ment seg til at verða snúningspunktið í framrættaða spælinum hjá føroyska landsliðnum, og tí er lítið at ivast í, at hann fer beint inn í føroysku byrjunaruppstillingina.

### Landsliðshópurin

| | |
|---|---|
| Jákup Mikkelsen | KÍ |
| René Tórgarð | EB/S |
| Gunnar Nielsen | Hearts |
| Jónas Tór Næs | NSÍ |
| Jóhan Troest Davidsen | NSÍ |
| Egil á Bø | EB/S |
| Jón Rói Jacobsen | Frem |
| Leif Niclassen | EB/S |
| Bartal Eliasen | ÍF |
| Fróði Benjaminsen | HB |
| Jákup á Borg | B36 |
| Símun Samuelsen | Keflavík |
| Bárður Olsen | EB/S |
| Atli Danielsen | Frem |
| Mikkjal Thomassen | EB/S |
| Bogi Løkin | NSÍ |
| Christian Høgni Jacobsen | AB |
| Christian Lamhauge Holst | Silkeborg |
| Andrew av Fløtum | HB |
| Arnbjørn T. Hansen | EB/S |

**Formula-deildin**

| | | dystir | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | EB/S | 24 | 16 | 3 | 5 | 47 | 27 | 20 | 51 |
| 2 | HB | 24 | 12 | 6 | 6 | 51 | 21 | 30 | 42 |
| 3 | B36 | 24 | 12 | 6 | 6 | 27 | 17 | 10 | 42 |
| 4 | NSÍ | 24 | 12 | 5 | 7 | 37 | 30 | 7 | 41 |
| 5 | Víkingur | 24 | 10 | 5 | 9 | 40 | 32 | 8 | 35 |
| 6 | B68 | 24 | 11 | 2 | 11 | 21 | 33 | -12 | 35 |
| 7 | ÍF | 24 | 8 | 3 | 13 | 29 | 42 | -13 | 27 |
| 8 | KÍ | 24 | 6 | 6 | 12 | 27 | 36 | -9 | 24 |
| 9 | B71 | 24 | 6 | 3 | 15 | 24 | 44 | -20 | 21 |
| 10 | Skála | 24 | 4 | 7 | 13 | 20 | 41 | -21 | 19 |

**Seinastu seks dystirnir**

| | | dystir | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 6 | 4 | 1 | 1 | 19 | 6 | 13 | 13 |
| 2 | NSÍ | 6 | 4 | 1 | 1 | 11 | 6 | 5 | 13 |
| 3 | EB/S | 6 | 4 | 1 | 1 | 12 | 8 | 4 | 13 |
| 4 | B68 | 6 | 4 | 0 | 2 | 7 | 5 | 2 | 12 |
| 5 | B36 | 6 | 4 | 0 | 2 | 6 | 4 | 2 | 12 |
| 6 | ÍF | 6 | 2 | 1 | 3 | 6 | 9 | -3 | 7 |
| 7 | Víkingur | 6 | 2 | 0 | 4 | 10 | 11 | -1 | 6 |
| 8 | KÍ | 6 | 1 | 1 | 4 | 4 | 8 | -4 | 4 |
| 9 | Skála | 6 | 1 | 1 | 4 | 5 | 12 | -7 | 4 |
| 10 | B71 | 6 | 1 | 0 | 5 | 3 | 14 | -11 | 3 |

**1. deild**

| | | dystir | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 07 Vestur | 24 | 18 | 2 | 4 | 101 | 32 | 69 | 56 |
| 2 | VB/S | 24 | 18 | 2 | 4 | 59 | 23 | 36 | 56 |
| 3 | AB | 24 | 18 | 1 | 5 | 85 | 31 | 54 | 55 |
| 4 | TB | 23 | 14 | 3 | 6 | 57 | 19 | 38 | 45 |
| 5 | Víkingur | 23 | 8 | 3 | 12 | 31 | 66 | -35 | 27 |
| 6 | NSÍ | 24 | 6 | 5 | 13 | 44 | 65 | -21 | 23 |
| 7 | HB | 23 | 5 | 7 | 11 | 27 | 46 | -19 | 22 |
| 8 | B68 | 24 | 6 | 3 | 15 | 44 | 60 | -16 | 21 |
| 9 | KÍ | 23 | 5 | 3 | 15 | 30 | 74 | -44 | 18 |
| 10 | EB/S | 24 | 5 | 1 | 18 | 23 | 85 | -62 | 16 |

# Keðiligur endi hjá Keflavík

**Talan varð um totalkiksara hjá Keflavík og Símuni Samuelsen, sum við trimum tapum á rað mistu íslendska meistaraheitið á stokkinum**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Landsbankadeildin er nú lokin, og endin gjørdist, at FH úr Hafnafjørðinum vann enn eitt íslendskt meistaraheitið. Keflavík við Símun Samuelsen á liðnum lá annars væl fyri at vinna sítt fyrsta meistaraheitið í 35 ár, men tíverri fyri Keflavík og Símun, so brast stóri dreymurin leygardagin.

3.850 áskoðarar sóu Keflavík tapa 1-2 ímóti Fram á heimavølli. Samstundis greiddi FH sína skyldu við at vinna 2-0 ímóti Fylkir á heimavølli. Símun Samuelsen legði annars Keflavík á odda 1-0, tá 54 minuttir vóru farnir, og tá varð rómurin stórur í Keflavík. Almarr Ormarsson javnaði til 1-1, og ta løtuna vóru Keflavík og FH jøvn í stigum, men Keflavík hevði í tí løtuni betri málmun.

Men tá 80 minuttir vóru farnir skifti íslandsmeistaraheitið eigara, tí tá legði Hjálmar Phórarinsson Fram á odda 2-1, sum gjørdist endaliga úrslitið. Talan varð sjálvandi um eitt stórt vónbrot fyri Keflavík og Símun Samuelsen. Fagnaðurin á Kaplakrika Leikvøllinum í Hafnarfirði varð øðiligur, tá FH lyfti meistarasteypinum, sum nevnist Ìslandsbikarið. Fyri stuttum vann FH 3-2 á Keflavík, tá varð støðan javnleikur 2-2, tá 90 minuttir vóru farnir. Her er nógv hjá Keflavík at iðra seg um.



*Keflavík og Símun Samuelsen høvdu øll kortini á hondini. Men teir taptu tríggjar teir seinastu dystirnar, og so kundi FH sníkja seg fram við og fara avstað við gullinum*